# Fólk til seruppgávu

Norrøna Felagið í Føroyum leitar eftir einum fólki, sum kann umsita Nordjobb í Føroyum í hesum árinum.

Uppgávan skal fremjast í trimum tíðarbilum. Í fyrsta lagi nú sum skjótast: at finna arbeiðspláss og bústaðir til minst tíggju nordjobbarar, sum koma til Føroya í summar. Í øðrum lagi: at fara á eitt skeið uttanlands frá 25.-29. apríl. Og í triðja lagi: at vera um nordjobbararnar, tá teir koma og eru her. Millum annað skipa fyri útferðum og øðrum frítíðartilboðum, og hjálpa teimum við at finna eitt nú rætta staðið at venda sær við praktiskum spurningum Tað verður frá 1. juni til hálvan august. Lønin er einans upphædd fyri øll trý tíðarbilini.

Vit skulu brúka eitt fólk, sum kann arbeiða sjálvstøðugt, og ikki minst loysa trupulleikar í einari handavend.

Áhugað kunnu fyrst spyrja Høgna Djurhuus á tlf. 217999, og/ella senda umsókn til Nordjobb/ Norrøna Felagið í Føroyum, J. Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn fyri tann 12. februar 2002 .

**Nordjobb og Norrøna Felagið í Føroyum**

(Nordjobb er ein norðurlendsk skipan, har sum fólk í aldrinum 18 til 26 ár arbeiða í nakrar summarvikur í einum øðrum Norðurlandi enn sínum egna).

# Starvsfólk til útibarnagarð

Leirvíkar Kommuna er í ferð við at seta útibarnagarð á stovn, og søkir í hesum sambandi eftir

**pedagogi og hjálparfólki**

at byrja 1. mars 2002 ella eftir avtalu.

Dámar tær væl at vera úti í náttúruni og ynskir tú nýggjar avbjóðingar, er hetta kanska nakað fyri teg.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, tlf. 215125, ella kommunuskrivstovuna, tlf. 443006.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum og ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **hósdagin 7. februar 2002.**

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Húsmóðir

Fulltíðarstarv sum húsmóðir á Føroya Blindastovni er leyst at søkja frá 1. mars 2002 - ella skjótast til ber.

Blind og sjónveik koma dagliga til ymiskar aktivitetir á stovninum.

**Starvið umfatar:**
- ábyrgd av køkinum
- innkeyp og matgerð
- ávísa reingerð á stovninum

**Starvið krevur:**
- at umsøkjarin hevur royndir í køki
- er røkin
- er positivur
- er tolin
- dugir við fólki
- fleksibul

Starvið er lønt eftir sáttmála hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Umsóknarfreist er 15. februar 2002.

Meira fæst at vita starvinum viðvíkjandi hjá leiðaranum á tlf. 318222

**Føroya Blindastovnur**

Íslandsvegur 10A • 100 Tórshavn
Postrúm 2074 • 165 Argir
Tlf. 318222 • Faks 319288
e-mail: blind@post.olivant.fo

# Bókavørður

Á Klaksvíkar Bókasavni er eitt starv sum Bókavørður leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:** Arbeiðið er fyri ein part í útláninum. Harumframt snýr arbeiðið seg um skráseting o.t.

**Førleikakrøv:** Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.

**Setunarviðurskifti:** Starvið verður at seta 15. mars 2002 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmálan við Starvsmannafelagið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Anniku Egholm bókavørð á Klaksvíkar Bókasavni.

**Umsókn:** Umsókn, saman við avritum av prógvi og møguligum viðmælum, verður at senda til:

**Klaksvíkar Bókasavn**
Postboks 45
700 Klaksvík

**Umsóknarfreistin** er 20. februar 2002

**Klaksvíkar Kommuna**

# Bókhaldstrupulleikar?

Vit átaka okkum bókhaldsarbeiði fyri fyritøkur og stovnar

Hetta umfatar m.a. hesar uppgávur:

- Fíggjarbókhald
- MVG uppgerð
- Fakturering
- Debitorrøkt
- Kreditorrøkt

Áhugað kunnu venda sær til:
Knút P. Jacobsen á tel 350 300 ella tel 228 486

**KERVI**
telð & tøkni

Heykavegur 2, P.O. Boks 3202, FO-110 Tórshavn
tel 350300, fax 350301, e-mail:info@kervi.com, www.kervi.com

# Frá S&K-felagnum

Ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia, Tórshavn
**leygardagin 16. februar 2002, kl. 16.00**
við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn formansins frá farna ári
2. Rokniskapur til góðkenningar
3. Val av tveimum nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4. Val av formanni
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

Uppskot til viðgerðar á aðalfundinum skulu vera felagnum í hendi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

Eftir fundin bjóðar felagið náttuða.

**SK Nevndin**

# Frá Frítíðarskúlanum í Trongisvági

Nú byrjar innskriving av børnum til skúlaárið 2002/2003. Seinasta freist er fríggjadagin 1. mars.

**Frítíðarskúlin, tlf. 372750**

www.sosialurin.fo



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2633, Sp/f Lómur, 600 Saltangará.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Bendtse Martin Svend Thomsen, 600 Saltangará.
Innkomin sum formaður: Samson Karl Frits Thomsen, 600 Saltangará.
Farin úr nevndini: Johan David Thomsen, 600 Saltangará.
Innkomin í nevndina: Símun Thomsen, 625 Glyvrar.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Johan David Thomsen, 600 Saltangará.
Innkomin sum stjóri: Bendtse Martin Svend Thomsen, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya tann 31. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 76, Sp/f Løgv, 600 Saltangará.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Bendtse Martin Svend Thomsen, 600 Saltangará.
Innkomin sum formaður: Símun Thomsen, 625 Glyvrar.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Johan David Thomsen, 600 Saltangará.
Innkomin sum stjóri: Bendtse Martin Svend Thomsen, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya tann 31. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2413, P/F Handilskjarnin, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 10.01.2002
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 14.08.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 1.000.000,00.

Skráseting Føroya tann 30. januar 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2900, P/F Valhalla, 188 Hoyvík.

Viðtøkur broyttar: 01.10.2001.
Nýggj adressa: 650 Toftir
Nýggj heimstaðarkommuna: Nes Kommuna.

Skráseting Føroya tann 30. januar 2002

Kristin Balle

---

Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Leiðarastarv

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir leiðara til roknskapardeildina á Strandfaraskipum Landsins.

**Uppgávur hjá roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina.

Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Rakstrar-, íløgu- og likviditetsætlan, herundir langtíðarætlanir
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga, mánaðar- og ársroknskapir, herundir budgeteftirlit og játtanarroknskapir.

**Uppgávur hjá leiðaranum**
Høvuðsuppgávurnar hjá roknskaparleiðaranum verða:
- Ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við búskaparstýringina
- Seta upp fíggjarætlanina við atliti til:
  - avmarking og útdelegering av avgerðarábyrgd
  - samskifti og samskipan millum stjóra og deildarleiðarar
  - motivatión fyri at røkka tilætlað úrslit
- Framløga av standard- og specialrapportum
- Menna innanhýsis mannagongdir í sambandi við gerð av fíggjarætlan, roknskapi o.ø.
- Fyriskipa upplæring, undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini
- Uppgávu- og starvslýsingar á deildini.

Í løtuni verður arbeitt við at umleggja búskaparskipanina hjá SL. Henda uppgáva verður ein spennandi avbjóðing fyri komandi roknskaparleiðaran, sum fær ein týðandi leiklut og ábyrgd fyri verkætlanini.

Eisini verður ætlaða byggingin av suðuroyarferjuni ein spennandi avbjóðing fyri roknskaparleiðaran.

**Førleikakrøv**
- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi
- Royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir innan fíggjarstýringarskipanir, so sum Navision Financials
- Royndir í projektleiðslu ein fyrimunur
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at umsita og menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 36. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 4. februar 2002. Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 34 30 00 ella e-postur: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*
*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutnings-anleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

**STRANDFARASKIP LANDSINS**

# AUTO

-Dag & nátt-

-Alt døgnið-




BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234

# DRAMA

Skipað verður fyri tveimum vikuskiftisskeiðum um skemt og undirhald. Byrjað verður fríggjakvøldið 15. februar kl. 19.30

Skeiðsleiðari. Magni Poulsen

Tilmelding og nærri kunning á tlf. 445115

Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Fuglafjarðar Kvøldskúli
Tlf. 444087